## Kórkonsert og bólkar hittast á Eiði

**Eiði:** Komandi leygarkvøld verður Ítróttarhøllin á Eiði karmur um tvær rættiliga ymiskar konsertir – ein konsert fyri kór og ein meiri traditionell gospelkonsert seinni sama kvøld.

Tann fyrra konsertin, ið byrjar kl. 19 verður ein sjáldsom blanding av góðum gospelkórum, tá fyrst Siloakórið, og síðani Vox og at enda United Voices fara at syngja.

Við hesa konsertina verður eisini felagssangur, har Eyðun á Lakjuni fer at spæla undir.

Seinni sama kvøld – kl. 22:30 – verður ein gospelkonsert, har fýra bólkar fara at spæla. Hesir bólkar eru MMM, Direct Level, Proclaim og Braquet.

Konsertin verður fyriskipað í samband við at ein bólkur av ungfólkum fer á missiónsferð til Kina í summar. Til hetta endamálið krevst sjálvandi peningur, og tí kunnu fólk stuðla hesum ungu, samstundis sum tey eru við til eina sera fjølbroytta konsert.

**sb.**

## 673 tons í mars mánaði

**Fiskiveiða:** Henda seinasta mánaðin hava útlendsk fiskifør úr einans trimum londum veitt í føroyskum sjóøki.

Tilsamans hava hesi fiskiførini veitt í 673,5 tons, harav nógv tann størsti parturin av veiðuni var longa – 230 tons. Umframt longuna hava hesi skipini eisini veitt 161 tons av brosmu, 75 tons av langasporli og sløk 68 tons av upsa.

Skipini, ið hava veitt í føroyskum sjóøki í mars mánaði hava verið úr Noregi, Fraklandi og Bretlandi. Av hesum trimum tjóðunum eru tað tey norsku sum eiga bróðurpartin av veiðuni, nevniliga 422 tons.

Hinvegin hava eingi russisk skip verið her og fiskað, og tí er t.d. heldur eingin svartkjaftur veiddur í farna mánaði.

**sb.**



*Bert fiskiskip úr trimum londum hava roynt í føroyskum sjóøki henda seinasta mánaðin*





# Rættir úlvar ræðast ikki regn

**350 úlvaungar úr øllum landinum savnaðir til stórt tiltak í Kvívík leygardagin**

SKÓTALÍV

*Snorri Brend*

*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Kvívík:** Veðurforsøgnin var ikki tann besta fyri Kvívík henda leygardagin.

Veðurmenninir boðaðu frá nakað av vindi, eins og tað skuldi vera yvirskýggjað og regn av og á. Og teir fingu rætt í tí.

Men hetta helt kortini ikki aftur teimum 350 úlvungum og leiðarum teirra, sum fyrrapartin leygardagin løgdu leiðina til Kvívíkar.

Her hevði skótaleiðslan fyrireikað seg til eitt rættiligt "ryk-ind", nú árligi úlvadagurin stóð á skránni.

Onkur óttaðist fyri, hvussu tað mundi fara at ganga, tá so nógvir úlvar komu saman. Um tað vóru nóg nógvir leiðarar í bygdini og so framvegis. Men tað bilti ikki.

Eftir tiltakið kundu øll bert staðfesta, at hetta hevði verið ein framúr góður dagur, hóast ein hevði kunnað ynskt sær meiri sól og nakað minni av ælingi.

Eftir kappingar, mat, og mong onnur tiltøk endaði dagurin, soleiðis sum rættir skótar gera tað, nevniliga við einum stórum legubáli.

Seint seinnapartin kundu so allir úlvaungarnir fara glaðir – men kortini troyttir - heim aftur til húsa.

# Nøvn á gøtur í Gøtu

**Líka so vist sum at eitt pluss eitt er tvey, er tað at ein av gøtunum í Gøtu eitur Tróndargøta.**

GØTUNØVN

*Snorri Brend*

**Gøta:** Í eina tíð hevur verið arbeitt við at fáa gøtunøvnini í teimum fýra bygdunum í Gøtu kommunu endaliga uppá pláss. Ein bólkur hevur sitið og arbeitt við málinum við m.a. Árant Hansen úr Norðragøtu Norðragøtu og Karl Thomsen umboðandi Syðrugøtu.

Gøta er jú gomul og kend søgulig bygd, og tað hevur hesin bólkurin eisini lagt sær í geyma. Tí eru m.a. allir Skeggjarnir "kallaðir" upp, eins og Tróndur í Gøtu.

Uppskotini til hesi nýggju gøtunøvnini í Gøtu hava eisini verið løgd fram fyri almenningin. Og eftir nakrar smærri broytingar eru nøvnini nú endaliga góðkend av øllum myndugleikum, verður sagt frá Gøtu bygdaráð.

Í farna mánaði kundi so bygdaráðið kunngerða hesi nøvnini, og vísa til møguleikan hjá almenninginum at síggja, hvussu gøtan hjá øðrum fólkum í bygdini eitur.

Í næstum verður farið undir at fyrireika skelting og annað, ið skal gerast í hesum sambandi.

